TIL SØLU
Tvey Playstation-spøl til sølu. Eagle One fyri 300 kr. og G-police CD1+2 fyri 400 kr. Samlað fyri 630 kr. Lítið brúkt.
Tlf. 310190 / 257929

HEVUR TÚ?
Hevur tú spølini Starcraft og Broodwar orginalt og vil gjarna selja, so vinarliga ring.
Tlf. 222124

TIL SØLU
Ein Playstation 2 við einum joystikki, einum memory card, og trimum spølum, til sølu fyri 3.500 kr.
Tlf. 220284

Tónleikur

TIL SØLU
Roland D50 Synthesizer, 1400 kr. Roland M-240 Line mixer, 3000 kr. Roland Sound canvas, ljóðmodul, 3000 kr. Bassforsterkari YS BL0080, 80W, 1500 kr. Emagic, Notator logic, tónleikaforrit til Macintosh teldur, 1000 kr.
Tel. 311443

TIL SØLU
Pioneer forsterkari 2 x 100 w, Pioneer flogu-spælari, 2 JBL 150 w hátalarar, JVC MiniDisc recorder. Til sølu fyri 6.000 kr.
Tlf. 220284

HEIMASTUDIO TIL SØLU
Ein óbrúktur 1/2 ára gamal Fostex X-24 multitracker til kasettubond: v/ 4 sporum + 2 x XLR input og 6 útgangir. Nýprísur 4300 til sølu fyri 2500 kr.
Tlf. 260590

FENDER HEARTFIELD
líkist Stratocaster, í góðum standi. www.42nd.net 2.750,- kr.
Tlf. 447254

YAMAHA HIFI
Yamaha HIFI stereo við Dali Grant hátalarum + JBL Subwoofer til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 226255

TIL SØLU
2x Mesa / Boogie forsterkarir, 50 caliber+ til sølu. 5.000 kr. pr. stk. Nýprísur: 11.000 kr.
Tlf. 316946

HEIMASTUDIO TIL SØLU
Ein óbrúktur 1/2 ára gamal Fostex X-24 multitracker til kasettubond: v/ 4 sporum + 2 x XLR input og 6 útgangir. Nýprísur 4300 til sølu fyri 2500 kr.
Tlf. 260590

Út- & Sjónvarp

SJÓNVARP
21" Samsung sjónvarp til sølu fyri 1800 kr. 2 1/2 ára gamalt, sera vælhildið.
Tlf. 228468

PARABOL
120 cm. parabolskál v/ stativi til sølu fyri 1700 kr. Gevur tær Sci-Trek o.a. kanalir sum vanliga ikki sígggjast í Føroyum. Sum nýggj.
Tlf. 228468

TIL SØLU
Ghettoblaster við band og fleguspælara til sølu fyri einans 750,- Radio riggar ikki.
Ring: 257461

TIL SØLU
Tandberg radio av slagnum Huldra 10.
Tlf. (+45) 22438134

Ymiskt

YNSKIST
Seymimaskina ynskist.
Tlf. 212358

FORMEL 1
2 ferðaseðlar til sølu til Formel 1 í Belgia.
Tlf. 421766

LAKERAÐ SVINGTRAPPA
úr limtræi, í góðum standi, 1/2 sving (180º), hædd 262 cm., breidd 80 cm, selist fyri 5.000 kr.
Tlf. 318675

TIL SØLU
Billardborð 3/4 match. Borðtennisborð. Trærennitól (drejebænk) við 8 skurðjørnum. Lítið frystiskáp
Ringið á tlf. 422302 best aftan á kl. 18

FERÐ TIL SØLU
Mini Cruise: Tórshavn-Bergen og aftur fyri ein í 4-koyggjukamari við hondvaski. Brúkast í summarsiglingsskeiðnum 2002 til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 422352 ella 216352

VENJARAR
Øll, sum hava áhuga í at vera venjari hjá Støkk komandi fimleikaár, eru vælkomin at ringja á tlf. 222447 áðrenn 9. august og hoyra nærri.
Fimleikafelagið Støkk

MISSIÓNSHÚSIÐ Í SKÁLAVÍK
Eydnuhjól verður í Missiónshúsinum leygarkvøldið og sunnukvøldið 10.-11. august kl. 18.00. Um onkur vil stuðla okkum takka vit fyri. Sólrun Christiansen, Friða Olsen, Friðleif Lydersen, Sunbjørg Djurhuus, Majbritt Lydersen, Marita Jacobsen.

BOSCH MULTIBAND
GSM 509 Dual kr. 200,-.
Tlf. 314103 ella 216103

MYNDATØL TIL SØLU
11/2 ára gamalt Minolta Dynax 500si v/3500 xi blitzi,eini Tamron 28-300 mm. aspheriskari linsu og einum óbrúktum stativi. Nýprísur 13.500 kr. til sølu fyri einans 8000 kr.
Tlf. 260590

MOTOROLA CD 160
fartelefon til sølu fyri kr. 300,-.
Tlf 314103 ella 216103

NOKIA 7110
3 mánadir gomul til sølu. Hon hevur: - WAP -Skjótiklapp (til verjing) - Scrollknapp (til skjótari leiting) - Infrared (til telduna) - Stórt display - 4 spøl -1000 nøvn í goymslu -Víbrator - sí rest á www.nokia.com/phones/7110 .Nýggj: 3000,- Nú: 1500,- inkl.porto.
triton_blue@yahoo.com

VIDEOKAMERA
Canon UC-V 200, hevur 22 x 20 mm/150 x digitalt 200 mm, við fylgja: ladari, taska, 1 band og leidningar til video 4.000 kr.
Tlf. 447254

NOKIA 3310
í góðum standi, ladari, kassi og brúksforvirring fylgja við. Til sølu fyri 800 kr.
Tlf. 447254

ERICSSON
T68, nýggj, brúksforvirring, ladari og emballaga fylgja sjálvandi við. Til sølu fyri 3.750,- kr.
Tlf. 447254

ERICSSON
T20S til sølu.
Tlf. 224910

FLYTING
av sofu úr Danmark til Føroyar. Er tað nakar, sum hevur pláss at taka eina sofu við úr Danmark til Føroya. Vit gjalda fyri eykaútreiðslur.
Tlf. 322077

OLJUTANGI
Innioljutangi 1200 l. við tilhoyr, til sølu. Kostnaður 1.000,- kr. Hevur bert staðið inni.
Tlf. 317636

ERICSSON
fartelefon, model T10S burturmist í Hósvík ella Tórshavn.
Tlf. 312036

URTAGARÐSMOLD
Góð urtagarðsmold fæst við at ringja:
Tlf. 218328

VINDEYGU
1 vindeyga B: 109cm; H: 118cm og 1 vindeyga B: 69cm; H: 118 cm. Í góðum standi. Til sølu fyri 350 kr. stk.
Tlf. 423572 / 210560

NOKIA 5510
Tvær Nokia 5510 til sølu. Prísur: 1.500 kr. pr. stk.
Tlf. 251237 / 266447

VINDEYGU
1 stk. vindeyga B: 178cm; H: 118cm (føst ramma). 1 stk. vindeyga B: 118,8cm; H: 80cm (uttan rút). Í góðum standi bíliga til sølu.
Tlf. 315089

TK Stovan

SKEIÐRØÐ UM ÚTFLUTNINGSTILBÚGVING

Sept. 2002 - Mai 2003
Mánadag kl. 15.30 - 21.00 á Hotel Føroyum í Havn

Útflutningstilbúgving
TK Stovan fer í heyst og vetur at skipa fyri einari skeiðrød um útflutning. Endamálið við verkætlanini er at menna útflutningstilbúgvingina hjá nøkrum føroyskum virkjum. Luttakandi virkini skulu hava serligan áhuga í og vilja at menna sín útflutningsførleika.
Málbólkurin eru smá og miðalstór virkir, sum hava ætlanir um eina útflutningstilbúgving í virkinum. Ein útflutningstilbúgving kann fremjast við ymiskum endamáli, til dømis fyri at styrkja kappingarførið innan- og uttanlands, við at altjóðamenna virki, og/ella at styrkja marknaðargrundarlagið hjá virkinum.

Skeiðrøðin, sum TK Stovan skipar fyri, er roynd fleiri ferð við góðum úrslitum seinastu 4 árini av okkara samstarvsfeløgum í Danmark. Øll sløg av virkjum kunnu luttaka, bæði framleiðslu-, handils-, og tænastuvirkir.
Útflutningstilbúgvingin fevnir um eina rød av skeiðum, har dentur verður lagdur á at finna fram til útflutningsmøguleikar hjá virkjunum. Eisini eru møguleikar at skapa samband millum luttakandi virkini, sum kunnu hava felags trupulleikar og áhugamál.

Hvat fær virkið burturúr
Oljuvinnan (BP, Faroese Partnership, Agip og Statoil) hevur stuðlað verkætlanini við kr. 350.000. Tí koma luttakandi virkini bert at gjalda kr. 10.000 (uttan mvg) í part.

Fyri peningin fær virkið:
- 20 tímar beinleiðis ráðgeving og hjálp til uppgávur frá roundum útflutningsráðgeva
- beinleiðis hjálp at finna møguligar samstarvsfelagar á útvaldum marknaði
- beinleiðis ráðgeving frá TK Stovuni
- 7 undirvísingarskeið, har øll evnir innan útflutning verða viðgjørd. Skeiðini, sum tilsamans eru 30 tímar, verða skipað sum kvøldskeið við døgurða
- møguleiki at skifta orð og royndir við onnur útflutningssinnað virkir
- loypandi stuðul og vegleiðing frá serligum ráðgeva, sum er knýttur at verkætlanini
- undirvísingartilfar og mat og drekka

Praktisk viðurskifti
Útflutningstilbúgvingin byrjar í september 2002 og endar í maj 2003. Í hesum tíðarskeiðnum hittast luttakararnir 7 ferðir.
Verkætlanin tekur støði í teimum trupulleikum, sum virkini renna seg í, tá tey fara undir útflutning. Val av evnum verða tillagað til tørvin hjá luttakandi virkjunum.
Vit mæla til, at tveir luttakarar eru úr hvørjum virki. Tað kann t.d. vera eigarin av virkinum, ein útflutningsseljari, ella tann sum stendur fyri søluni á heimamarknaðinum.
Vit leggja dent á at góðir karmar eru um skeiðini, og at vit fáa góðan mat, kaffi og køkur. Alt er íroknað luttøkugjaldinum.

Modulir við innihaldi
Mánadag kl. 15.30-21.00

Modul 1: 9. september 2002 - Inngangur – Hví útflutning
Modul 2: 14. oktober 2002 - Útflutningsstrategi
Modul 3: 11. november 2002 - Samstarvshættir og leiðsla
Modul 4: 9. desember 2002 - Flutningur og vørutillaging
Modul 5: 13. januar 2003 - Gjaldstreytir og fígging
Modul 6: 10. februar 2003 - Dømi við einum marknaði
Modul 7: 12. mai 2003 - Erfa bólkur

Tilmelding:
TK Stovan, fax 31 93 63, tlf. 31 73 66 ella teldupost: tk@tk.fo
Tilmelding í seinasta lagi **mánadagin 19. august 2002.**
Kostnaður: kr. 10.000,00 u/mvg.

Boða frá luttøku
Er tykkara virki áhugað í at luttaka í hesari verkætlan, ella ynskja tit at fáa fleiri upplýsingar, eru tit vælkomin at seta tykkum í samband við TK Stovuna. Pláss er fyri 10 virkjum við tveimum luttakarum fyri hvørt virki. Um fleiri enn 10 virkir tekna seg tilskilar TK Stovan sær rætt til at velja millum tilmeldaðu virkini.

Virkisnavn: Tal av luttakarum:

Navn/nøvn:

Tel.: Fax:

TK Stovan
Niels Finsens gøta 37, FO-100 Tórshavn
Tel +298 317366, **Fax** +298 319363
tk@tk.fo
www.tk.fo

VILJI VITAN VØKSTUR
TK Stovan er ein liður í menningini av føroyska vinnulívinum og samstundis ein partur av tí umfevnandi danska TIC-kunningarsamstarvinum.

HEILSANIR

Góða Rebekka og Sirið
Hjartaliga tillukku við 7 og 9 ára føðingardøgunum. Vit elska tykkum.
Alt tað besta frá Teresu, pabba og mammu



Hey hey gamli maður!
Eg vildi bert ynskja tær hjartaliga tillukku við teimum »mongu« árunum ...still going strong!
Heilsan »hin systurin«
P.S. Ríður tú nakað enn??? hehehe

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum á ymiskan hátt gjørdu okkum hjúnabandsdagin tann 6. juli 2002 so ógloymandi.
Sonja og Eyðun

Góði elskaði Bjartur
Hjartaliga tillukku við 4 ára føðingardegnum 7. august.
Ynskja Levi gubbi og systkinabarnið Rebekka

Góðu tit bæði
Hjartaliga tillukku við 90 ára føðingardegnum.
Heilsan foreldur og verforeldur

Góða elskaða Rebekka
Vit ynskja tær hjartaliga tillukku við tínum fyrsta føðingardegi í dag 7. august. Vit elska teg.
Ynskja Linda og Jógvan Emil

Góði fitti abbi
Hjartaliga tillukku við degnum 8. august. Takk fyri at tú ert so góður við meg.
Heilsan Niels

Góði elskaði Bjartur
Hjartaliga tillukku við 4 ára føðingardegnum 7. august.
Ynskja omma og abbi á Hvítanesi

Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

5 ferðir um vikuna

Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag. Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Friggjad. ❑Leygard.

Tekstur:.....
.....
.....
.....
.....
.....

Myndina aftur: Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: .....
Bústaður: .....
Bygd/býur: ..... Tlf.: .....

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«